

# Starvslýsing

## Leiðari til Sosialu deild hjá Porkeris- og Vágs kommunu

**Ert tú sosialráðgevi av fullum huga?**

Kundi tú hugsað tær avgerandi ávirkan á, hvussu sosialu viðurskiftini í Porkeris og Vágs kommunu verða skipað í framtíðini?

Porkeris- og Vágs kommuna hava samtykt, at seta eina sosiala deild á stovn tann 1. august 2007, og søkja tí eftir leiðara til nýggju deildina, sum verður í Porkeri.

**Starvið**
Leiðarin skal vera við til at byggja upp sosialu deildina, so hendan verður virkin tann 1. august 2007.
Leiðarin kemur at hava ábyrgd av allari fyrisiting av deildini, herundir málsviðgerð av almannamálum, sum sambært lóggávuni eru ella verða løgd til kommunurnar.
Leiðarin verður skrivari og ráðgevi hjá sosialu nevnd hjá Vágs kommunu, og ráðgevi og málsviðgerði hjá Porkeris kommunu.
Leiðarin kemur eisini at hava samskifti við m.a. barnaverndina, tannlækna, kommunulækna, skúlaheilsusystur, heilsusystur, tannlæknar, serlærarar, dagstovnar, kommunalu dagrøktina og landsmynduleikar.

Starvið er sett til 3/4 starv.

**Førleikakrøv**
Vit leita eftir persóni, íð er útbúgvin sum sosialráðgevi. Tó kunnu eftir umstøðunum eisini aðrir umsøkjarar lúka treytirnar, um teir hava aðra í minsta lagi miðallanga útbúgving innan heilsu-, almanna- ella skúlaverkið.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og í seinasta lagi 1. august 2007. Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðisgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

**Fleiri upplýsingar**
Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Vágs kommunu, Petry Joensen tel. 37 30 24 ella tel. 22 87 18

Ert tú áhugað/ur?

Send eina skrivliga umsókn saman við prógvum, CV og møguligum og viðmælum til:
Vágs kommunu
Att.: Sosiala nevnd
Vágsvegur 22
FO-900 Vágur

Umsóknin skal verða okkum hendi í seinasta lagi 4. juni 2007 kl. 15.00

**Vágs kommuna**
Vágsvegur 22 • 900 Vágur
tlf 37 30 24 • vagur@vagur.fo

---

Pitstop í Hornabø

# Vit LADA upp til summarið

## Er bilurin klárur til feriuna?

Skulu dekkini skiftast ella kanska oljan?
So koyr framvið hjá Olaf og hann tekur sær av hesum bæði skjótt og væl




**Dekkprísir – við áseting**

| | | |
|---|---|---|
| 155/80-13: | 450,- | pr. stk. |
| 175/65-14: | 600,- | pr. stk. |
| 185/65-14: | 720,- | pr. stk. |
| 195/65-15: | 790,- | pr. stk. |
| 205/55-16: | 1.150,- | pr. stk. |
| 205/40-17: | 1.275,- | pr. stk. |
| 225/45-17: | 1.345,- | pr. stk. |
| 225/40-18: | 1.690,- | pr. stk. |
| 235/35-19: | 2.145,- | pr. stk. |

Áseting, avbalansering og mvg er íroknað prísin

Umfram nevndu dekk, hava vit eisini nógv onnur á goymslu.

Nú hava vit eisini opið leygardag frá 10.00 til 16.00

**AKFARSØLAN**
Bilverkstaður og dekksøla · Tel 320 322

LADA

Grafikmaster tel 227000

---

# FARMAKONOMSTARV á SUÐUROYAR APOTEKI

Eitt av starvsfólkum okkara fer í farloyvi.
Tí tørvar okkum ein farmakonom at byrja 1. august 2007.
Starvið er tíðaravmarkað í eitt ár.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 4. juli 2007. Send umsóknina til:

**Suðuroyar Apotek**
**undir Heygnum 2**
**800 Tvøroyri**

Meiri fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 371076 og spyrja eftir Fríða ella senda teldupost til: fridi.jensen@apotek.fo

**www.apotek.fo**

---




# SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akfaradeildina at byrja skjótast gjørligt. Talan er um eitt fast fulltíðarstarv.

**UPPGÁVAN**
Uppgávan fevnir m.a. um:

· Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
· Skráseting av akførum
· Avgreiðslu av skrásetingargjøldum
· Eftirstøðumál
· Kassauppgerð

**FØRLEIKAKRØV**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

**SETANARTREYTIR**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Hans Jacob Stenberg, deildarleiðara, á telefon 35 04 08. Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **4. juni 2007**.

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umfram høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

REFROZ